# OLJUFELØG VAK FYRI HETLANDS

**VØKSTUR** Oljuleiting í Hetlandsrennuni sum heild og harvið eisini á føroyska landgrunninum hevur verið í støðugum vøkstri seinastu 5-7 árini, og tað eru ábendingar um, at hesin vøkstur fer at standa við komandi árini sigur Heri Ziska á Jarðfeingi eftir ráðstevnu í London.

Jan Müller

Kappingin um at fáa oljufeløgini at brúka sínar leitimilliónir er stór í nógvum pørtum av heiminum. Føroyar eru partur av hesi kapping, og til tess at marknaðarføra landgrunnin til framtíðar boringar krevst, at føroyskir myndugleikar fylgja væl við og eisini luttaka á altjóða ráðstevnum og messum.

Herfyri vórðu fleiri fólk frá Jarðfeingi á stórari altjóða messu í London fyri at fáa eitt nú oljufeløg at vísa áhuga fyri leiting á føroyska landgrunninum. Ein av føroysku luttakarunum var Heri Ziska, ein av serfrøðingunum hjá Jarðfeingi, tá tað um undirgrundina ræður.

– Hetta er ikki fyrstu ferð tit royna at marknaðarføra føroysku undirgrundina. Hvat varð øðrvísi hesaferð?

– Høvuðsmunurin er, at nú kunnu feløg altíð søkja um øki tey halda vera áhugaverd, í mun til at tey fyrr einans kundu søkja í samband við eitt útbjóðingarumfar. Fokus í marknaðarføringini er tí broytt til at vera meira málrættað mótvegis einstøkum økjum heldur enn føroyska landgrunninum sum so.

– Hvat kom burturúr?

– Tað er ofta ilt at siga ítøkiliga, hvat kemur burturúr. Tí at tað er ikki frá degi til dags, at feløg avgera at fara inn í nýggj lond at leita eftir olju. Vit fingu tó gott samband við ávís oljufeløg. Hvørt tað endar við onkrari umsókn um eitthvørt opið øki, ella at viðkomandi feløg keypa seg inn í verandi loyvi, er torført at meta um.

Heri Ziska sigur, at tey fingu nógvar fyrispurningar um atgongd til dátur á føroyska landgrunninum, bæði frá universitetum og frá feløgum, sum arbeiða í økinum (seismikkfeløg, konsulentfeløg o.o.). Uppfylgjandi fyrispurningar eru longu komnir á Jarðfeingi eftir framsýningina í London. Fyrimunurin við hesum er, at fleiri arbeiða við føroyska økinum.



*Føroyski básurin á oljumessuni í London.*

Eisini vóru fleiri seismikkfeløg framvið og spurdu um, hvussu tey skulu fyrihalda seg, um tey skulu savna seismiskar dátur inni á føroyska landgrunninum.

### Kappingin sera hørð

– Hvønn týdning hevur slík marknaðarføring av føroyska landgrunninum fyri framtíðar leiting?

– Tað er týdningarmikið at vera úti um seg og alla tíðina breiða út vitan og á tann hátt skapa áhuga fyri oljuleiting á føroyskum øki, tí at kappingin er sera hørð millum ymisk øki kring um í heiminum.

– Hevur lógarbroytingin við at kunna lata loyvi uttan útbjóðing – sokallaða Open door skipanin - ítøkiligan týdning fyri leitingina við Føroyar?

– Tað hevur hon. Hon er enn eitt nýtt amboð vit kunna nýta í okkara royndum at menna leiting á landgrunninum.

### Nógv feløg vitjaðu

Stórur áhugi var fyri at vitja føroyska básin. Heri Ziska sigur, at tað vóru 15 oljufeløg, 9 seismikkfeløg og 7 universitet, sum komu framvið. Okkurt oljufelag hevði avgjørt, at tey ikki høvdu áhuga í Føroyum, og onkur eru frammanundan í Føroyum. Áhugin hjá hinum var ymiskur. Okkurt felag hevði sett arbeiðsbólk at kanna føroyska økið, meðan onnur vóru meir úti fyri at forhoyra seg, hvørjir møguleikar eru.

– Geva hesar vitjanir ábendingar um, at oljufeløg og onnur feløg eru hugað fyri at brúka pengar at gera kanningar og eisini bora á